**VENJINGARTÍÐIR HJÁ AB**
Innanduravenjingartíðir hjá AB eru:
Mánadag: kl. 15 pinkur, kl. 16 børn undir skúlaaldur, kl. 20 5.deild/old boys, kl. 21 gentur 14-17 ár.
Týsdag: kl. 21 3. og 4. deild.
Mikudag: kl. 16 smápiltar, kl. 17 piltar, kl. 21 kvinnudeildin.
Hósdag: kl. 16 dreingir.
Fríggjadag: kl. 17 gentur 10-12 ár.
Vant verður í fimleikahøllini á Argjum.
*AB*

**DRAGIHURÐ TIL SØLU**
Hvít harmonikuhurð við rútum í til sølu fyri 800 kr. Er 207 cm høg og kann blíva upp til 120 cm breið, er í góðum standi.
*Tlf. 315152*

**TIL SØLU**
Eitt blandingsbattarí til brúsu til sølu fyri 500 kr. Innhurðar, 2 eru útskornar og 2 hava karm, til sølu.
*Tlf. 424567 - 252939*

**EL SKRIVIMASKINA**
Sera lítið brúkt el-skrivimaskina av slagnum AEG Olympia Carrera Si, bíliga til sølu. Kann eisini brúkast sum printari.
*Tlf. 361004*

**TIL SØLU**
Spanskt kursus av slagnum Linguaphone, innihaldandi 9 fløgur og 4 bøkur, til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 457428 - 217428 e. kl. 18*

**RADIATORAR TIL SØLU**
10 stk. radiatorar, stødd 220 cm., til sølu fyri 400 kr. stk.
*Tlf. 210420*

**SIEMENS 35 FARTELEFON**
til sølu. Ein mánað gomul. Til sølu fyri 1.000 kr. Taska fylgir við.
*Tlf. 210207*

**NOKIA 8210**
við bláum ljósi i display til sølu fyri 2.200 kr. Við fylgir ein dupult ladari og 3 cover.
*Tlf. 253950*

**DVD NINTAUS**
Kodufríur, lítið brúktur og er í góðum standi. Til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 253950*

**STUTTLEIKA TÆR**
Minst til at senda inn spurnaskema. Drigið verður næstu ferð 1. december.
*Aase Bømler Olsen*

**JÓLABORÐHALD Í JÓMSBORG**
Um nóg nógv tekna seg, verður jólaborðhald við sangi, skemti og føroyskum dansi í Jómsborg fríggjakvøldið 30. nov. kl. 21. Øll dansifeløgini í oynni luttaka. Sigið frá sum skjótast ella í seinasta lagi leygardagin 24. nov. hjá einum av formonnunum í dansifeløgunum.
*Jómsvíkingar*

**JÓLASØLA**
Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag verður í Badmintonhøllini 1. og 2. des.
*Føroya Heimavirkisfelag*

**DREINGJAKLÆÐIR YNSKJAST**
Hevur tú smart og snøgg brúkt dreingjaklæðir, str. 80-86 liggjandi og ynskir at selja, so ring vinarliga
*tlf. 255133*

**HJÁLMUR TIL PRUTL**
Súkkluhjálmur til vaksin ynskist.
*Tlf. 322070, Lise*

**DIESEL TANGI**
Rustfríur diesel tangi, 40 l. til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 253782*

**SÓL TIL SØLU**
Lítið brúkt dupultsól bíliga til sølu.
*Tlf. 422141*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur eftir Kristin í Geil til sølu. Stødd við rammu 44 x 55 cm. Boð undir 10.000,- kr. hava ikki áhuga.
*Tlf. 310569*

**GRUNDSTYKKI TIL SØLU**
Grundstykki til sølu Í Garðinum í Klaksvík, matr. nr. 579 b, 400 kvm.
*Tlf. 257339*


máling & gólv

TEPPIR

NAIRN
vinylgólv
+ ókeypis álegging

Laminatgólv
Flisar
Tundurgólv

Tey ótrúliga slitsterku
Wicanders
Parkettgólv

máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066



Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



Lesið internet Sosialin !






## Ársins jólatilboð.

Í tíðarskeiðinum 23 - 25 nov. tekur yrkismyndamaður, Rógvi Johansen jólamyndir av børnum, í forrætningini hjá Fa. Ellen Dahl í Vági.

Avgreiðið tykkara jólamyndatøku í góðari tíð og í friðarligum og hugnaligum umhvørvið, bílegging er ikki neyðug, tygum eru vælkomin inn á gólvið allar dagarnar millum kl. 14.00 - 18.00

Í ár hava vit "pressa" prísin heilt í botn, ikki nokk við tí, vit hava eisini eitt eyka tilboð til tykkum, Tit fáa heilt ókeypis eina portrætmynd av barninum, í stødd 13x18 cm*

Jú, tað er satt, 10 jólamyndir v/brævbjálva* + eina portrætmynd í stødd 13x18cm*. Men bert frá 23-25 nov.



Alt hettar fyri EINANS kr. 99,95

* Um td. fleiri systkin eru saman á einari jólamynd, verður í staðin tikin ein felags mynd av børninum.* Um fleir enn 10 myndir ynskjast, er kostnaðurin tá kr. 12,- fyri hvørja efturfylgjandi mynd.

Vinarliga Fa. Ellen Dahl
v/Solveig Johansen
FO-900 Vágur
tlf. 373086 / 373769



## Avloysari til skrivstovuna

í sambandi við at ein skrivstovukvinna fer í barnsburðarfarloyvi, væntandi í mars næsta ár, sóknast vit eftir røskum fólki, sum avloysari, til skrivstovu okkara.

Vit bjóða eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.

**Arbeiði umfatar:**
- at passa telefon
- at selja
- at avgreiða ordrar
- at tollgreiða v. m.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur skrivstovuútbúgving ella royndir á økinum
- at tú hevur kunnleika til teldu; Word, Excell og Concorde
- at tú ert ágrýtin og røkin
- at tú ert fyrikomandi og álítandi
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú hevur góð samstarvsevnir

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen.

**Umsóknir:**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum o. ø. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. desember.

**Vatnsoyra Snikkaravirki pf.**
FO-385 Vatnsoyrar
Tlf. 332177



KPMG

## Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði. Bókhaldsskipanin (excel) MS Office verður nýtt.
Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

**Umsøkjarin**
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars verða fyrikomandi og fryntligur.
Kunnleiki til bókhaldsskipanina (excel) MS Office, er ein fyrimunur, men eingin treyt.
Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 10. desember 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Rúna Poulsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

team85

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo E·mail: kpmg@kpmg.fo


## Aðalfundur

hjá Tórshavnar Ítróttarráð verður hósdagin 13.12.01 kl. 19.00 í kantinuni í ítróttarhøllini á Hálsi.

**Nevndin**



# HEILSANIR



**Góða, elskaða Sólvá**
Mamma, babba og vit báðar ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 22. nov. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Heilsan, Turið & Tóra**



**Góða, elskaða Ulla**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan, Hjørdis omma og Tórbjørn abbi**



**Hygga eitt stjørnuskot!!!**
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum!
**Heilsan, you know…**
P.S. Eisini ein heilsan til Rudi Rasmussen, sum fyllir 26!



**Góða Ninna-omman**
Hjartaliga tillukku á 75 ára degnum í dag. Takk fyri alt tú er fyri okkum.
**Heilsan, Bergur og Sveinur**



Gita hvør verðsins besti abbi er? Tað er tú. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 22. nov. Gud vælsigni teg og framtíð tína.
**Bestu heilsanir, Junior og Kristianna**



**Góði, elskaði Jákup**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
Bestu ynski frá
**ommu, abba og mambá**



**Elskaði Elias**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum í dag ynskja
**omma, abbi og mambá**



**Góði onkel**
Hjartaliga tillukku á 50 ára degnum. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Ninni**



**Góði beiggi**
Lukku og gleði á tínum 1 ára degi. Eg elski teg.
**Heilsan, Dan xxx**



**Góði Jákup**
Lukku og gleði á tínum 1 ára føðingardegi ynskja
**omma og abbi í Íslandi**



**Góði Bartal**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Alt tað besta ynskja
**mamma og babba xxx**



**Góði, elskaði Jákup**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 22. nov.
**Muss og klemm frá mammu og babba**



**Góði, elskaði beiggi**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum í dag.
**Heilsan, Maria**
P.S. Nú ert tú klárur til fótbóltsdyst.

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**